menta
skrásettir grannskoðarar

# Judo Føroyar

## Tórshavn

(V-tal 358.665/611.050)

# Ársfrásøgn

# 2024

Ársfrásøgnin framløgd og góðkend á aðalfundi tann 16 / 08 2025

fundarstjóri

RO2023.920/MN


MENTA skrásettir grannskoðarar Spf · J. Broncksgøta 16 · Postrum 16 · 110 Tórshavn · Tel 310901 · t-post menta@menta.fo · www.menta.fo

# INNIHALDSYVIRLIT

| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðsluátekning | 3 |
| Vátta frá óheftum grannskoðara | 4 - 5 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 - 7 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 10 - 12 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Judo Føroyar<br>Gundadalur<br>P.O. boks 223<br>FO-110 Tórshavn | |
| | T-postur:<br>Heimasíða:<br>Telefon:<br>Telefaks: | judo@judo.fo<br>www.judo.fo<br>31 76 85<br>31 24 21 |
| | V-tal:<br>Roknskaparár: | 358.665/611.050<br>1. januar til 31. desember |
| **Nevnd** | Sofus Debes Johannesen, formaður<br>Kristianna Solberg á Túgvu<br>Sanna Nolsøe Djurhuus<br>Silja Johannesen, nevndarlimur<br>Andrias Sumberg, nevndarlimur | |
| **Grannskoðari** | **MENTA**<br>skrásettir grannskoðarar Sp/f<br>J. Broncksgøta 16<br>Postboks 16, FO-110 Tórshavn<br>Telefon 780 900, Telefax 319 640<br>t-postur: menta@menta.fo<br>www.menta.fo | |

## LEIÐSLUÁTEKNING

Leiðsla felagsins hevur í dag viðgjørt og endaliga viðtikið ársfrásøgnina fyri 2024 hjá Judo Føroyar.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi lógum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari og niðanfyristandandi nýttum roknskaparhátti. Umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025".

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðuni, úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum og at felagið hevur nóg gott gjaldføri til framhaldandi rakstur.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 16 / 8 2025

Nevnd: Sofus Debes Johannesen,
formaður

Kristianna Solberg á Túgvu,
nevndarlimur

Sanna Nolsøe Djurhuus
nevndarlimur

Silja Johannesen,
nevndarlimur

ANDRIAS SUMBERG
~~Sigmundur Johansen~~
nevndarlimur

RO2023.920/MN

menta
skrásettir grannskoðarar

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA UM VÍÐKAÐ GJØGNUMGONGD

**Til limirnar í Judo Føroyar**

**Niðurstøða**
Vit hava útint víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapinum hjá Judo Føroyar fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2024. Ársroknskapurin, ið fevnir um nýttan roknskaparhátt, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur, er gjørdur eftir lógum felagsins. Umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025".

Við støði í útinta arbeiðinum er tað okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2024 og av úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2024 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Vit hava útint okkara víðkaðu gjøgnumgongd í samsvari við føroyska váttanarstandardin fyri smærri virkir og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralóggávuni um víðkaða gjøgnumgongd av ársroknskapinum, ið er gjørdur eftir nýttum roknskaparreglum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri víðkaðu gjøgnumgongdini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi og hóskandi prógv, ið kunnu verða grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Nevndarábyrgd av ársroknskapinum**
Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. nevndin hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið nevndin metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd nevndsins at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at nevndin hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at nevndin í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri víðkaðu gjøgnumgondini av ársroknskapinum**
Okkara ábyrgd er at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Hetta krevur, at vit leggja til rættis og fremja gerðir við atliti til at fáa avmarkaða vissu fyri okkara niðurstøðu um ársroknskapin og harumframt útinna vit serstøku arbeiðini, ið eru áløgd við atliti til at fáa størri vissu fyri okkara niðurstøðu.

Ein víðkað gjøgnumgongd fevnir um gerðir, ið fyrst og fremst eru fyrispurningar til leiðslu, og har tað er gagnligt til onnur í virkinum, greiningar og tey serstøku arbeiðini, ein víðkað gjøgnumgongd áleggur, umframt at mett verður um tey prógv, ið eru fingin til vega. Vavið av tí arbeiði, sum verður gjørt í sambandi við víðkaða gjøgnumgongd, er minni enn ein grannskoðan, og tí geva vit ikki ársroknskapinum eina grannskoðanarniðurstøðu.

Tórshavn, tann 18 / 8 2025

**MENTA Sp/f**
Skrásett grannskoðaravirki

Alvi S. S. Nielsen
skrásettur grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri ásettu roknskaparrelgum. Umframt eftir "Reglugerð fyri grannskoðan av sersambondum frá 24. februar 2025". Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

Ársfrásøgnin verður gjørd í donskum krónum (DKK). Allar upphæddir í ársfrásøgnini verða avrundaðar til heil tøl, og tí kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summi av teimum undirliggjandi tølunum.

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða rakstrarførdar so hvørt, sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til, við tíðaravmarkingum svarandi til roknskaparárið, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, avsettum skyldum og afturføringum frá broyttum roknskaparligum metingum, ið áður eru innroknaðar í roknskapin.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðarfíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ognir og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirðið, og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur sum gjøllari lýst niðanfyri.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðismettar til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, tá ið føst effektiv renta verður roknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaútveganarvirði við frádrátti fyri møguligum avdrátti umframt til-/frágongd fyri samlaðari amortisering av muninum ímillum útveganarvirði og áljóðandi upphædd.

Tá ið ognir og skyldur verða innroknaðar og virðismettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

Møgulig marknaðarlig virðisminking á ognum í árinum verður mett ikki at verða varandi.

### Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða staðfestar. Stuðul og aðrar sáttmálainntøkur verða tiknar við tá hesar eru játtaðar og verða tíðaravmarkaðar.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

### Fíggjarstøða

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum. Ella til endurvinningarvirðið, um tað er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Útveganarvirði eru kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at íløguni fram til, tá ið ognin verður tikin í nýtslu. Útveganarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær er ymisk.

Avskrivingar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð (livitíð) og ásett restvirði (scrapvirði) og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keyps¬mánaði. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Rakstrartól | 10 ár | 10% |

Vinningur ella tap við sølu av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum sølupris, frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virði søludagin og rakstrarført undir avskrivingar.

**Áogn**
Áogn verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkað ogn er rakstrarkostnaður, ið hoyrir til komandi ár. Tíðaravmarkingar skyldur, er inngjøld sum viðvíkja inntøkum í komandi roknskaparári.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur er kassa-, gjaldskort- og innlánspeningur.

**Fremmand skuld**
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virðið roknskapardagin.

**Veð- og eventualskyldur**
Veð- og eventualskyldur verða upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársfrásøgnini.

menta
skrásettir grannskoðarar

# RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar - 31. desember

| | Notur | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Landskassastuðul frá ÍSF | | 581.014 | 540.594 |
| Lýsingarinntøkur, landskappingin, menn | | 35.000 | 35.000 |
| Inntøkur fyri luttakarum/feløgum | | 85.981 | 68.209 |
| **Inntøkur íalt** | | **701.995** | **643.803** |
| **Kostnaðir** | | | |
| Útreiðslur, Landslið | 1 | -569.182 | -264.563 |
| Útreiðslur, Lands- / FM-kappingin | 2 | -29.084 | -31.016 |
| Útreiðslur, til skeið | 3 | -86.043 | -142.506 |
| Útreiðslur, til altjóða fundir | 4 | -14.144 | -72.506 |
| Kontrast FM - felags roknskapur | 5 | 9.643 | 3.000 |
| Felagskostnaður | 6 | -35.313 | -33.574 |
| Fyrisitingarútreiðslur | 7 | -110.442 | -121.822 |
| **Kostnaður í alt** | | **-834.565** | **-662.987** |
| **Rakstrarúrslit** | | **-132.570** | **-19.184** |
| Avskrivingar | 8 | -8.274 | -8.274 |
| **Úrslit, áðrenn fíggjarpostar** | | **-140.844** | **-27.458** |
| Fíggjarkostnaður o.t. | | -1.070 | -3.315 |
| **Ársúrslit** | | **-141.914** | **-30.772** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| OGN | Nota | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Mátta | | 68.973 | 77.247 |
| **Materiell støðisogn** | 9 | **68.973** | **77.247** |
| **Støðisogn** | | **68.973** | **77.247** |
| Skuldarar | | 38.582 | 62.654 |
| Forútgoldnar rokningar | | 4.382 | 0 |
| **Áogn** | | **42.964** | **62.654** |
| Tøkur peningur | | 42.196 | 143.735 |
| **Peningur** | | **42.196** | **143.735** |
| **Ogn í umferð** | | **85.160** | **206.389** |
| **OGN SAMANTALT** | | **154.133** | **283.635** |

| SKYLDUR | | | |
|---|---|---|---|
| Eginogn | | -13.058 | 17.714 |
| Ársúrslit | | -141.914 | -30.772 |
| **Eginpeningur** | | **-154.971** | **-13.058** |
| Lán Gjáar Bókhaldsvirki | | 90.759 | 0 |
| Vøru- og tænastuognarar | | 218.345 | 296.693 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **309.104** | **296.693** |
| **Skuld** | | **309.104** | **296.693** |
| **SKYLDUR SAMANTALT** | | **154.133** | **283.635** |

# NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 1. Útreiðslur, landslið** | | |
| **Útreiðslur, manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -140.370 | -86.068 |
| Uppihald í útlandinum | -55.266 | -50.725 |
| Kostur í útlandinum | -6.608 | -11.100 |
| Annað | -11.291 | -5.198 |
| **Útreiðslur, kvinnuslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | 0 | -12.987 |
| Uppihald í útlandinum | 0 | -1.890 |
| Kostur í útlandinum | 0 | -797 |
| Annað | 0 | -1.120 |
| **Útreiðslur, Ungdóms kvinnuslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -110.982 | -28.740 |
| Uppihald í útlandinum | -18.130 | -3.779 |
| Kostur í útlandinum | -3.394 | -759 |
| Aðrar útreiðslur, ungdóms kvinnu-lið | -6.033 | -465 |
| **Útreiðslur, Ungdóms manslandsliðið** | | |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -187.517 | -55.934 |
| Uppihald í útlandinum | -12.577 | -3.779 |
| Kostur í útlandinum | -7.281 | -759 |
| Annað | -9.732 | -465 |
| | **-569.182** | **-264.563** |

| | | |
|---|---|---|
| **Nota 2. Útreiðslur Lands- / FM-kappingin** | | |
| Ferðakostnaður, Lands / FM-kappingar | 0 | -4.808 |
| Heiðursmerkir | -7.619 | -5.258 |
| Annað | -21.465 | -14.500 |
| **Útreiðslur Steypa- / Grans Prix-kappingin** | | |
| Heiðursmerkir | 0 | -6.450 |
| | **-29.084** | **-31.016** |

| | **2024** | **2023** |
|---|---|---|
| **Nota 3. Útreiðslur til skeið** | | |
| Løn/samsýnining/kostnaður fyri skeiðshaldara | 0 | -4.340 |
| Ferðing og koyring | -25.925 | -33.643 |
| Uppihald og kostur, skeiðshaldari v.m. | -12.495 | -21.295 |
| Annað | -620 | 0 |
| **Útreiðslur til dómaraskeið** | | |
| Ferðing og koyring, dómaraskeið | -19.757 | -27.026 |
| Uppihald til dómaraskeið | -16.805 | -25.962 |
| Kostur til dómaraskeið | 0 | -311 |
| Aðrar útreiðslur til dómarskeið | -1.358 | 0 |
| **Útreiðslur til venjaraskeið** | | |
| Ferðaútreiðslur | -3.161 | -11.912 |
| Kostnaður fyri skeiðhaldara | 0 | -12.348 |
| Aðrar útreiðslur | -4.770 | -1.500 |
| Kostur til venjaraskeið | -1.124 | -4.169 |
| Aðrar útreiðslur | -28 | 0 |
| | **-86.043** | **-142.506** |

**Nota 4. Útreiðslur til altjóða fundir**

| | | |
|---|---|---|
| Ferðakostnaður | -4.584 | -31.131 |
| Uppihald | -9.409 | -41.375 |
| Annað | -151 | 0 |
| | **-14.144** | **-72.506** |

**Nota 5. Kontrast FM - felags roknskapur**

| | | |
|---|---|---|
| Stuðulsinntøkur | 20.000 | 20.000 |
| Atgongumerkir | 7.150 | 5.900 |
| Inngjald frá Sersambondum | 30.000 | 30.000 |
| Gjald fyri veistlu | 59.000 | 54.000 |
| Útreiðslur fyri veitslu | -85.665 | -100.878 |
| Annað | -20.842 | -6.022 |
| | **9.643** | **3.000** |

**Nota 6. Felagskostnaður**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarútreiðslur | -223 | -84 |
| Umboðan | -1.614 | -3.915 |
| Limagjøld | -14.944 | -14.914 |
| Klæðir - Búnar | -6.780 | -5.176 |
| Heimasíða | -11.423 | -9.485 |
| Annað | -330 | 0 |
| | **-35.313** | **-33.574** |

| **Nota 7. Fyrisitingarútreiðslur** | **2024** | **2023** |
|---|---|---|
| Skrivstovuhald | -11.144 | -18.613 |
| Tól, teldur oa | -38.379 | -40.050 |
| Telefon, fax og internet | -11.291 | -11.505 |
| Bókhald | -18.000 | -11.250 |
| Grannskoðan | -21.563 | -13.000 |
| Avsett ímóti tapi, áogn | 0 | -17.738 |
| Flytingarprov. | -7.652 | -7.932 |
| Aðrar útreiðslur | -2.414 | -1.734 |
| | **-110.442** | **-121.822** |

| Nota 8. Støðisogn | Rakstrartól | Rakstrartól |
|---|---|---|
| Útvegnarvirði, primo | 91.932 | 71.238 |
| Tilgongd i árinum | 0 | 20.694 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| Útveganarvirði, ultimo | 91.932 | 91.932 |
| Avskrivað primo | -14.685 | -6.411 |
| Avskrivað í árinum | -8.274 | -8.274 |
| Avskrivað ultimo | -22.959 | -14.685 |
| **Virði 31.12.2024** | 68.973 | 77.247 |

**Nota 9. Veðsetingar og eventualskyldur**

Sersambandið hevur ongar veð- ella eventualskyldur við roknskaparárslok